# Fullveldisblusurnar ganga sum heitt breyð

**Skulu vit døma eftir søluni av Ja- og Nei-blusunum, er svarið higartil eitt greitt Ja fyri fullveldi**

FULLVELDI

*Turið Kjølbro*

Rættiliga stórur eftirspurningur er eftir fullveldisblusunum sum klædnahandilin í SMS, Hanus og Janus, hevur selt nú í nakrar vikur. Í byrjanini vórðu nógv fleiri Nei-blusur seldar, síðani fingu Ja-blusurnar rættiliga vind í seglini og tað hava tær framvegis.

– Fólk hava veruliga reagerað uppá hesar blusurnar. Vit selja rættiliga fitt av Ja-blusum framvegis, men tað kann verða so skjótt, sigur Ann Maria Johansen, sum arbeiðir í Hanusi og Janusi.

Einki alternativ er til Ja og Nei. Einki kanska. Ella bæði og. So tey, ið higartil hava ognað sær eina fullveldisblusu, hava tikið støðu. Nógvar blusur eru gjørdar og í løtuni verða fleiri prentaðar.

Tað var eftir eitt kjak í Sjónvarpinum, at Schumann Hjaltalin, ið eigur klædnahandilin Hanus og Janus, fekk hugskotið at gera Ja- og Nei-blusurnar. Til ber at keypa Ja- og Nei-blusu í svørtum og hvítum. Kostnaðurin er 129,- krónur fyri hvørja.




*Sóley Magnussen og Oda Ellingsgaard, báðar í starvsvenjing í Hanusi, avmyndaðar í fullveldisblusunum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nýggjar bøkur til børn og ung

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út fýra bøkur. Talan er um sniðskornu smábarnabókina Sleipnin eftir Alex Wilson, myndabókina Kiskus dugir nógvar gátur eftir Ulf Löfgren, barnabókina Søgan um bláa knøttin eftir Andri Snær Magnason og ungdómsbókina Angin av Vanilju eftir Liinu Talvik.



Sleiparin er fitt, sniðskorin bók um Sleiparan og óheppnu manningina: Skegga skipara, Sáruskipsgentu, Maskin Martin, Veru viðhaldsgentu og Kolbein kokk. Bókin er skapað sum bátur, og tá ið tú letur upp, ert tú umborð í bátinum og sært, hvat manningin tekst við. Sleiparin er úr haldgóðumpappi, 12 síður í litum og kostar 75 krónur í bókabúðunum. Hestprent stóð fyri prentumsitingini.

Kiskus dugir nógvar gátur er søga um eitt kettuhúski, sum býr langt inni í Stóraskógi. Tey eru mamman, pápin og sonur teirra, Kiskus. Sum í øllum røttum ævintýrum fer Kiskus út í verðina at hyggja seg um og leita eftir eydnuni. Frá mammu síni fær hann eitt knýti av klæðum og ein bláan stein, sum hann kann brúka at ynskja seg heima aftur við. Ferðin gerst minniligt og ikki sørt spennandi, tí Kiskus skal ígjøgnum nógvar vandar og royndir á vegnum. Ella Smith Clementsen týddi úr svenskum. Kiskus dugir nógvar gátur er 28 síður í litum, bundin inn í stíva kápu. Bókin kostar 95 krónur í bókabúðunum. Hestprent stóð fyri prentumsitingini.

Søgan um bláa knøttin er spennandi og hugvekjandi barnabók, myndprýdd við nógvum myndum í litum. Søgan fer fram á einum bláum knøtti longst úti í rúmdini. Har býr eitt ótal av børnum, sum ongantíð verða vaksin. Tey eru villbørn, tí eingin er, ið sigur teimum, hvat tey skulu gera, og hvussu tey skulu verða. Børnini sova, tá ið tey eru móð, og eta, tá ið tey eru svong, og tey spæla júst har, sum tey hava hug til.

Eitt kvøldið, tá ið Brimir og Hulda eru niðri í Svørtufjøru, kemur ein stjørna til stjørdar á luftini, og hevur kós beint ímóti teimum. Stjørnan lendir í fjøruni við ógvusligari sprenging. Í roykinum hómast ein óhugnalig vera, ið stendur úti í myrkrinum. Tá byrjar eitt hættisligt ævintýr, sum leiðir børnini um myrkar skógir, djúpar dalar og bláan himmal. Tá verður, sum ongantíð áður, kravt nógv av vinalagi og snildi hjá børnunum á tí bláa knøttinum.

Søgan um bláa knøttin er einasta íslendska barnabók, ið hevur fingið bókmentaviðurkenningina fyri fagurbókmentir. Viðurkenningina fekk bókin í 1999, tá ið hon var givin út fyri fyrstu ferð.

Áslaug Jónsdóttir myndprýddi bókina, og Lavina Niclasen týddi úr íslendskum. Bókin er 94 síður í litum og hevur stíva permu. Hon kostar 120 krónur í bókabúðunum. Hestprent stóð fyri prentumsitingini.

Angin av vanilju er nýggj ungdómsbók, ið er um vinalag og ábyrgd, ein sterk søga um lív og deyða. Men hóast evnið er álvarsamt, er skrivingarlagið lætt og við hvørt eisini skemtiligt. Omman hjá Siri hevur krabbamein og gerst sjúkari og sjúkari. Floksfelagin Coco roynir at hjálpa Siri at fáa megina at venda sjúkragongdini. Eitt undur skal henda, so at omma Siri ikki skal doyggja. Men undur kosta. Hvør er Coco? Hjálpir hann Siri, ella hjálpir hann henni ikki? Hon ivast, men verður alsamt meira hugtikin av tí løgna Coco, sum ger alt fyri at koma í samband við hana.

Liina Talvik hevur skrivað ungdómsbókina Góði Gud, tak ter um reiggj, sum Bókadeildin gav út í fjør. Alexandur Kristiansen hevur týtt báðar bøkurnar úr svenskum. Angin av vanilju er 128 síður og kostar 110 krónur. Bókin er umbrotin og heft hjá Einars Prenti í Tórshavn.







